


# Snák til **stór og smá**

**Snák í Miðlon selur barnaklæði. Dentur verður lagdur á at hava klæði til børn og ung í aldrinum 0 til 16 ár, og eisini tær størru støddirnar fáast í Snák**

**FERÐAFRÁGREIÐING**

**Dagfinn Olsen**
dagfinn@sosialurin.fo

Snák í Miðlon hevur sum endamál at røkka allar familjur, og hevur barnaklæði til børn og ung í aldrinum 0 til 16 ár. Og eisini ber til at fáa stórar støddir í Snák.

Dentur verður eisini lagdur á at hava klæði, sum øll hava ráð at keypa, men tó uttan at hetta gongur út yvir góðskuna.

Í Snák leggja tey seg nevnilga eftir at hava dygdargóða vøru, so ikki verður spart í so máta, sí dygdin skal vera í hásæti.

## Stórt úrval

Eisini leggja tey í Snák dent á at hava stórt úrval, soleiðis, at handilin røkkur allar familjur.

Snák gnongur á 4. ári nú, og í Snák lata tey væl at umstøðunum í Miðlon, og tey hava eisini verið við har, síðani byrjan.

Tvey fólk eru í føstum starvi í Snák, og fýra fólk eru knýtt at handlinum.











